## Krabbin doyði

Um vikuskiftið lýsti tað stóra Fiski- og Sjóvinnusavnið í Esbjerg við, at tað hevði fingið ein stóran kongakrabba úr Noregi, og at fólk vóru vælkomin at hyggja eftir honum, nú skúlarnir hava vetrarfrí hesa vikuna. Men í gjár boðaði savnið frá, at krabbin var deyður. Morten Hahn-Pedersen, savnsleiðari, sigur við JydskeVestkysten, at helst var sjógvurin í tanganum á savninum og heitur. Hitin var 14 stig, og krabbin skal helst hava eini 8 stig.



## Gangsta rapp til Føroya

Ein tann kendasti og best umtókti danski rapp-bólkurin, Suspekt, vitjar í vikuskiftinum. Bólkurin, ið er mannaður av teimumum fýra Bai-D, Orgi-E, Rune Rask og Troo.l.s, kemur úr harða umhvørvinum í Albertslund. Seinasta útgávan hjá Suspekt, Prima Nocte, tók ummælarar á bóli. Bólkurin fekk eisini sera góð ummæli fyri sína konsert á Roskilde Festivalinum í fjør. Teir fingu seks stjørnur frá Gaffa. Umframt fleiri løg, sum hava verið tráðspæld í donskum útvarpi, hava teir fýra rappararnir úr Albertslund millum annað gjørt tónleik til Drengene Fra Angora. Suspekt, sum eisini arbeitt við føroyska myndamanninum, Bárði Eklund, hevur útgivið tríggjar fløgur. Suspekt fer at framføra í Eclipse fríggjakvøldið og í TB-húsinum leygarkvøldið.

# Frá Toll- og Skatt til TAKS

**Toll- og Skatt ynskti ein nýggjan samleika og eitt nýtt navn, sum skuldi vera lætt at siga og vera føroyskt. Í kapping millum starvsfólkið valdi Stephansons Hús út navnið TAKS**

SAMLEIKI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tollur, Avgjøld, Kolvetni, Skattur.

Hetta er grundarlagið undir nýggja heitinum hjá nú fyrrverandi Toll- og Skattstovu Føroya. Og so taldi tað við, at orðið eisini kann skiljast sum at vera til taks – fyri viðskiftafólkið.

Á tíðindafundinum í Norðurlandahúsinum í morgun greiddi Arnold Nielsen, stjóri í TAKS, frá, at uppgávan hjá stovninum er at tryggja landinum inntøkur gjøgnum skatt, avgjøld og toll. Og ein av orsøkunum til nýggja samleikan er, at teksturin skal gerast nógv meiri lætt skiljandi, tí ofta eru orðingarnar gjørdar á einum juridiskum máli, sum vanligi borgarin kann hava ilt við at skilja.

- Tað skal verða lætt at gera rætt, sum Arnold Nielsen tók til.

Hinvegin skal tað gerast meiri trupult hjá teimum, sum tilvitað royna at sleppa undan at rinda avgjøld til landið.

- Tað finnast eingi hagtøl yvir hetta, men hví skuldu føroyingar verið øðrvísi enn onnur fólkasløg í so máta, segði Hjørdis Gaard




*Arnold Nielsen, stjóri og Hjørdis Gaard, frá TAKS og Ingvør Nolsøe, frá Stephansson Húsi á tíðindafundinum í Norðurlandahúsinum í morgun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Nýggj heimasíða

Ein av broytingunum, sum Ingvør Nolsøe hevur staðið fyri, er ein nýggj heimasíða. TAKS ætlar at fylgja við tíðini, og tað fer skjótt at bera til at avgreiða mvg-uppgerðirnar umvegis teldupost. Hendan skipanin verður ætlandi tikin í nýtslu í mai í ár.

Sjálvuppgávan kann longu sum er latast inn pappírleyst um teldupostin, og hetta er ein skipan, sum bæði borgarin og TAKS vinna við.

Ingvør Nolsøe greiddi eitt sindur frá, hvussu arbeiðið við at broyta samleikan til TAKS var farið fram. Tey hava alla tíðina arbeitt í tøttum samstarvi við starvsfólkini á stovninum, og í sambandi við heimasíðuna hevur lýsingafyritøkan spurt seg fyri hjá hópinum av fólki og virkjum, fyri at fáa hana so viðkomandi sum gjørligt.

Øll broytingin fer fram tí stovnurin ynskir at verða so greiður, sum gjørligt í samskiftinum við viðskiftafólk síni, sum praktiskt eru allir tilkomnir føroyingar.

Men hvat hesin nýggi samleikin kostar skattaborgarunum, meldar søgan kortini einki um.

# Vandi fyri íslendskum skrædli

**Alarmklokkurnar ýla og reyðu fløggini veittra, nú Ísland er komið á dagsordanin á altjóða fíggjarmarknaðunum**

FÍGGJARKREPPA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað nærkast einum fíggjarligum skrædli í Íslandi, eftir at íslendska krónan í gjár kavaði mótvegis evruni og harvið eisini donsku krónini. Tað vilja fleiri keldur verða við, sum blaðið Børsen hevur tosað við.

Eitt stórt skrædl í einum av størstu íløgufeløgunum í Íslandi er ikki ósannlíkt, og áhugin savnast serliga um felagið Exista, sum er nær við at hava mist allan eginpeningin.

Exista hevur gjørt stórar íløgur í eitt nú íslendskar og norðurlendskar fíggjarligar fyritøkur so sum Kaupthing Banka og Sampo Group, sum hava mist virði undir kredittkreppuni.

### Avsanna kritikkin

Exista sjálvt avsannar kritikkin og kallar báðar íløgurnar »langsiktaðar, strategiskar íløgur«.

Exista er ein av størstu íslendsku fyritøkunum, mett eftir aktuella marknaðarvirðinum upp á 12,5 milliardir krónur. Men sambært útrokningum, sum Nordea hevur gjørt fyri dagblaðið Børsen, er fyritøkan nær við at vera tekniskt insolvent.

Eginpeningurin er í seinasta roknskapi gjørdur upp til 17,7 milliardir krónur, men rættingar í sambandi við kursfall á børsskrásettum partabrøvum umframt goodwill, er í veruleikanum bert ein milliard krónur eftir í eginkapitali.

Exista er høvuðsaktionerur við 23,7% av partabrøvunum í Kaupthing Banka, sum eigur danska vinnubankan FIH. Harumframt eigur Exista 20% av finska tryggingarsamtakinum Sampo Group. Bæði eru uppgjørd til keypsprísin og eru tískil ikki rættað til sambært fallandi kursunum seinastu tíðina.

- Verður bert hugt at børsskrásettu aktivunum hjá felagnum og uppger tey til marknaðarvirðið, samstundis sum bókførda goodwill'ið verður tikið burtur, vísa útrokningarnar, at skuldin í felagnum er nærum eins stór sum aktivini, sigur partabrævaanalysustjórin í Nordea, Michael West Hybholt, við Børsen.




*Landsbanki Íslands er settur undir eygleiðing saman við Glitnir Banka*

Hann vísir tó samstundis á, at felagið hevur tryggjað sær fígging av virksemi sínum fram til miðan 2009, og reint roknskapartekniskt einki skeivt hevur gjørt.

### Sett undir eygleiðing

Íslendsku trupulleikarnir hava leingi verið samrøðuevni millum stórar partar av fíggjarligu marknaðunum. Kredittmetingarfyritøkan Moody's hevur nýliga sett Glitnir Banka og Landsbanka Íslands undir eygleiðing, sum er fyrsta stigið móti einari endaligari niðurgradering.

Moody's tosar um myrk skýggj yvir bankasektorinum, men sambært analysustjóranum, Michael West Hybholt, hava nógvir íleggjarar leingi verið varnir, tá tað kemur til íslendsku bankarnar.

- Øll á partabrævamarknaðinum undrast á, hvør hevur útvegað kapital, og tað sæst aftur í partabrævakursunum hjá bankunum. Og orsakað av krossognarskapinum millum íslendsku feløgini er vandi fyri, at eitt kreppurakt felag hálar onnur við sær niður, sigur Michael West Hybholt við dagblaðið Børsen.